# ÓTRYGGLEIKI SKUNDAR UNDIR ÁTRÚNAÐ

Í **SAMFELØGUM**, HAR SOSIALU **UMSTØÐURNAR** ERU **ÓTRYGGAR**, HEVUR **ÁTRÚNAÐUR** GÓÐAN **GRÓÐRARBOTN**. Í SAMFELØGUM, HAR **SOSIALI** TRYGGLEIKIN ER **STÓRUR**, OG **FELAGSSKAPURIN** MILLUM **BORGARARNAR** ER STERKUR, ER **MINNI** TØRVUR Á **ÁTRÚNAÐI**. USA ER SERA **ÁTRÚNAÐARLIGT** LAND ORSAKAÐ AV **ÓTRYGGUM** SOSIALUM **UMSTØÐUM**, MEÐAN **DANMARK** ER LÍTIÐ **ÁTRÚNAÐARLIGT** LAND, TÍ SOSIALU **UMSTØÐURNAR** ERU **BETRI**. Í FØROYUM HEVUR **ÁTRÚNAÐUR** STERKAN **GRÓÐRARBOTN**. KEMST TAÐ AV SOSIALUM **SKEIVLEIKUM**, HÓTTANDI **NÁTTÚRUNI** ELLA KANSKA **GOMLUM VANA?**





**ÁTRÚNAÐUR**

**Uni Arge**
ua@sosialurin.fo

Tá tjóðarinnar fedrar í USA orðaðu grundlógina hjá nýggja samveldisríkinum, sum hevði tikið loysing frá Onglandi í 1776, løgdu teir dent á, at fólkastýri og átrúnaður skuldu vera atskild. Á hendan hátt vóru teir langt framman fyri sína tíð, tí mangastaðni verður enn tosað um, at statur og kirkja eiga at verða skild sundur. Tá danskarar fingu sína grundlóg í 1849, hendi júst tað øvugta av tí, sum hendi í USA. Staðfest varð, at statur og kirkja hoyrdu saman, og kongur og kirkja fingu pláss fremst í grundlógini, tó at fólkastýrið varð væl lýst.

Við so ymiskum grundlógum skuldi verið sjálvsagt, at USA menti eina siðvenju, har politikkur og átrúnaður vóru greitt sundurskild, og at Danmark menti eina siðvenju, har politikkur og átrúnaður vóru blandað saman. Men so varð ikki. Í USA hendi júst tað øvugta, tí átrúnaður hevur altíð havt eina sterka støðu í samfelagnum. Í Danmark er átrúnaðurin veikur og hevur so at siga onki annað eyðsýnt pláss í samfelagnum enn, at borgararnir gjalda kirkjuskatt, hóast bara ein lítil partur av fólkinum tímir at ganga í kirkju.

Amerikanski professarin, Phil Zuckerman, ið starvast á universitetinum í Århus, segði mánakvøldið í fyrilestri á DR 2, at munurin millum amerikanska og danska samfelagið, tá um átrúnað ræður, kann tykjast at vera ein løgin andsøgn. Men verður hugt at, hví átrúnaður verður so nógv dyrkaður í USA og nógv minni í Danmark, sæst skjótt, at umstøðurnar hjá fólki hava stóra ávirkan á, hvussu átrúnaðarlig tey eru. Og stórur munur er á, hvussu fólk hava tað í USA og í Danmark.

## Kenslan av samanhaldi

Í USA eru summi fólk ovurrík og líða onga neyð, men talan er bara um nøkur fá prosent av fólkinum. Tey flestu stríðast fyri at fáa endarnar at røkka saman, og mong eru eisini fátøk og heimleys. Sjúkratrygging hava amerikanarar onga havt, útbúgving kostar, og nógvur kriminalitetur er í landinum. Hetta skapar onga veruliga kenslu av samhaldsfesti og ger fólk ótrygg.

> *Í Danmark er átrúnaðurin veikur og hevur so at siga onki annað eyðsýnt pláss í samfelagnum enn, at borgararnir gjalda kirkjuskatt, hóast bara ein lítil partur av fólkinum tímir at ganga í kirkju*

Fjøltáttaða samansetingin av fólkasløgum hevur eisini við sær, at fólk fyri at fáa eina kenslu av samanhaldi taka seg saman í átrúnaðarligar samkomur.

Í Danmark og hinum skandinavisku londunum eru sjúkratrygging og útbúgving tryggjað gjøgnum felagsskapin, og kriminaliteturin er minni enn í USA. Fá eru fátøk, og uppaftur færri eru heimleys. Vælferðarsamfelagið skapar millum fólk eina sterka kenslu av samhaldsfesti og tískil eisini tryggleika. Higartil hava skandinavisku samfeløgini eisini verið rættiliga einsháttað, hvat fólkasamanseting viðvíkur, tó at hetta er farið at broytast. Enn hava fólk tó ikki havt tørv á at fáa eina kenslu av felagsskapi í átrúnaðarligum samkomum.

Kirkjan í Danmark er eisini í teirri støðu, at sama hvussu nógvar fjepparar hon hevur, hórar hon undan fíggjarliga, tí hon fær kirkjuskatt. Av tí, at kirkjur og samkomur í USA ikki hava hendan framíhjárætt, hava tær verið noyddar at gera nógv vart við seg sjálvar. Stórir eru skálarnir, har fólk verða boðin innar at lovprísa Várharra. Góðir eru tónleikabólkarnir, sum spæla har, og karismatiskir eru prædikumenninir, ið hava orðið. Amerikanskar kirkjur duga at undirhalda fólki. Um okkara leiðir hava tær ikki tørv á tí.

## Meiri sekularisering

Phil Zuckerman nevndi í sínum fyrilestri, at nú samanbrestirnir millum ymsar átrúnaðir, serliga kristindómin og islam, eru vorðnir munandi meira eyðsýndir, enn teir hava verið leingi, m.a. í sambandi við Muhammed-tekningarnar, skuldi ein hildið, at danskarar savnaðu seg um kristindómin. Men tað gera teir ikki. Teir eru bara vorðnir uppaftur meira tilvitaðir um sekularisering og fólkaræðislig virðir. Nógv bendir á, at jú meira teir verða hóttir uttaneftir, jú meira skifta teir orð um hóttanirnar heldur enn at biðja hægri maktir um frelsu frá teimum.

Eftir fyrilesturin hjá amerikanska professaranum mánakvøldið var orðaskifti um hesar spurningarnar, har umboð fyri etiska ráðið, gudloysingar og kristin vóru við. Í orðaskiftinum varð m.a. víst á, at væl kann tað vera, at meirilutin av danskarum hevur ikki stórvegis áhuga fyri kirkjuni, men ógvuliga fá mótmæla, at tey skulu